## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann minkar vindin niður í andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt. Seinnapartin strúkur í vindi av suðri og útsynningi og regn. Hitin millum 3 og 6 stig




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og ælingur, men seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind av útnyrðingi og vátaslettingur. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin frískar hann vindin av eystri og kavi. Hitin um frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fyrst lot av ymsum ættum, seinni frískar hann vindin av eystri. Lítið ella einki avfall og hitin um frostmarkið.

# Komedia í Sjónleikarhúsinum

**SJÓNLEIKUR**
*Havnar Sjónleikarfelag og Spírar*

Havnar Sjónleikarfelag setir í hesum døgum hol á sítt sekshálvfjersinstjúgunda leikár við einum víðakendum nskum skemtileiki. Leikurin verður settur upp í samstarvi við áhugaleikbólkin Spírar, sum so dyggiliga gjørdi vart við seg seinasta vár við stórleikinum Músafellan eftir Agathu Christie.

Talan er um leikin Renn fyri vívinum(Run for your Wife) eftir Ray Cooney. Ray Cooney er mest kendur fyri sínar lívligu skemtisjónleikir, men hevur eisini drúgvar royndir innan leikstjórn og sum leikari.

Renn fyri vívinum er skrivaður í 1984 og er síðani framførdur í fleiri enn 30 londum. Til stuttleika kann nevnast, at leikurin í fjør varð framførdur í Reykjavík og Bergen, og 20.02.02 í ár verður leikurin frumsýndur í leikhúsinum í Lathi í Finlandi.

Søgan fer fram í London í fyrru helvt av 1980inum. Vit hitta John Smith, sum er hýruvognsførari. Hann er av óvart giftur við tveimum konum í senn, og ger hetta lívið hjá honum eitt sindur strævið, serstakliga tí konurnar ikki vita av hvørji aðrari. Tá so løgreglan fær frænir av hesum gerst støðan bara verri, so John noyðist næstan at renna fyri lívinum við vívunum í hølunum.

Her skal ikki avdúkast meira, uttan tað at áskoðarin við egnum eygum sær, at tvær ikki altíð eru betri enn ein. Leikurin verður framførdur við einum sera høgum tempo, replikkirnar eru skjótar og livandi, so at áskoðarin næstan verður blástur aftur í stólin.

Jákup Veyhe er leikstjóri. Hann hevur drúgvar royndir sum leikari og rithøvundur, men hevur seinnu árini serliga lagt seg eftir at leikstjórna. Jákup leikstjórnaði Músafelluna í Sjónleikarhúsinum í fjør og hevur júst leikstjórnað klaksvíkingunum í leikinum Mostir Charlie, sum í vetur hevur spælt kring landið við sera góðari móttøku.



*Hallur Hjalgrímsson, Ronnie Poulsen, Aksel Joensen, Nicolai Falck, Beinta Clothier, Kristina Sørensen, Heini Poulsen og Heðin Johannesen eru leikarar í leikinum, sum verður frumframførdur 23. februar*

Týtt til føroyskt hevur viðingurin Andrias Justesen, sum eisini týddi Mostir Charley, fyri Klaksvíkar Sjónleikarfelag

Samansetingin av leikarum er sera spennandi. Teir flestu av sjónleikarunum hava drúgvar royndir í leikum sum, Krypilin av Ynishmaan, Fótur í hosu, Pippi Langsokkur og Skeyk.

Tey leikandi eru: Hallur Hjalgrímsson, Ronnie Poulsen, Aksel Joensen, Nicolai Falck, Beinta Clothier, Kristina Sørensen, Heini Poulsen og Heðin Johannesen.

Frumframførsla verður í Sjónleikarhúsinum í Havn 23. februar kl. 18.00.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷20 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷11 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | ÷10 |
| Reykjavík | ÷6 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 9 |
| Tromsø | – |
| Bergen | – |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 14 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | – |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 4 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 953 hPa. sunnan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað. Eitt annað lágtrýst, 972 hPa. vestan fyri Føroyar stendur eisini í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




Lágtrýstið við Føroyar fer eystureftir og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/02 kl. 06⁰⁰– 07/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,5°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,6 mm – mált frá 06/02 kl. 06⁰⁰– 07/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 50,0 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212

www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

30. januar: Mánin næstur jørðini
4. februar: Seinna kvarter
12. februar: Tendring
14. februar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. feb | 03.38 | 16.04 | 02.38 | 15.04 | 02.53 | 15.19 | 05.38 | 18.04 | 06.38 | 19.04 | 01.53 | 14.19 | 00.53 | 13.19 | 03.53 | 16.19 | 04.53 | 17.19 | 03.23 | 15.49 | 04.38 | 17.04 |
| 9. feb | 04.29 | 16.54 | 03.29 | 15.54 | 03.44 | 16.09 | 06.29 | 18.54 | 07.29 | 19.54 | 02.44 | 15.09 | 01.44 | 14.09 | 04.44 | 17.09 | 05.44 | 18.09 | 04.14 | 16.39 | 05.29 | 17.54 |
| 10. feb | 05.20 | 17.46 | 04.20 | 16.46 | 04.35 | 17.01 | 07.20 | 19.46 | 08.20 | 20.46 | 03.35 | 16.01 | 02.35 | 15.01 | 05.35 | 18.01 | 06.35 | 19.01 | 05.05 | 17.31 | 06.20 | 18.46 |
| 11. feb | 06.09 | 18.33 | 05.09 | 17.33 | 05.24 | 17.48 | 08.09 | 20.33 | 09.09 | 21.33 | 04.24 | 16.48 | 03.24 | 15.48 | 06.24 | 18.48 | 07.24 | 19.48 | 05.54 | 18.18 | 07.09 | 19.33 |

5 707265 100050 >